Umhvørvisstovan
Postboks 2048
165  Argir

Stílað: Útskiftingarnevndini fyri Líðarhaga

Tórshavn 9. januar 2021

**<u>Útskifting í Líðarhaga í Mykinesi</u>**

Í sambandi við, at útskifting er í Líðarhaga í Mykinesi vilja vit, sum eigarar av Lauritsartrøð matr. 59 í Mykinesi, senda hetta mótmælið.

Søgan um Lauritsartrøð er hon, at abbi okkara, Laurits Joensen, sum trøðin ber navn eftir, leigaði trøðna, sum hann saman við pápa sínum legði inn av haganum og velti. Trøðin var í nógv ár hansara leigutrøð og við loyvi frá øllum ognarunum í Líðarhaga og frá Landbrugsráðnum, keypti hann trøðna í 1949.

Sambært matrikuldómi, tinglisin 22. 04. 1980, er av okkum ókendari orsøk Líðarhagi komin at standa sum eigari av matr.nr. 59 í Mykinesi, sjálvt um tað okkum vitandi ikki hevur verið ókent í Mykinesi, at Laurits í sínari tíð keypti trøðna. Vit hava skeytið, at so er. Í apríl 1980 er somuleiðis tinglisin leigusáttmáli av trøðni til synir Laurits, John og Poul Joensen.

Vit hava í áratíggju heitt á hagastýrið um at fáa ognarviðurskiftini formaliserað sambært veruligu ognarviðurskiftunum, men uttan úrslit.

Vit senda tískil við hesum okkara viðmerkingar í sambandi við útskifting í Líðarhaga í Mykinesi og mótmæla, at hagastýrið í Líðarhaga stendur sum eigari av Lauritsartrøð.

Viðhongd eru avrit av hesum skjølum:

1. Útskrift frá skiftirætttinum í 1935 har Laurits Joensen fær rætt til leigutrøðna eftir faðir sín.

2. Játtan, dagsett 22. juli 1946, við undirskriftum frá ognarmonnum í Líðarhaga at selja Lauritsi trøðna.

3. Svarskriv frá Landbrugsráðnum til umsókn um keyp av trøðni, har eisini kostnaðurin er upplýstur íroknað tinglýsing. Viðheft er somuleiðis kvittan fyri gjald av trøð og tinglýsing.

4. Undirskrivaða og stemplaða skeytið, dagsett 4. apríl 1949, og váttað av ríkisumboðnum 2. juni 1949. Viðheft er eisini "Synsforretning" yvir ognina í Líðarhaga í Mykinesi. Dagsett 11. februar 1949.

5. Bræv til hagastýrisformannin, dagsett 13. juli 1993, um at rætta mistakið, ið er gjørt í 1980.

6. Bræv frá Klett advokatum til hagastýrið dagsett 20. 04. 2011.

7. Bræv frá Klett advokatum til hagastýrið dagsett 18. 06. 2012.

Viðmerkjast skal, at enn er einki aftursvar komið frá hagastýrinum.

Vit vænta, at hetta mál verður tikið upp og rættað, og at vit frætta aftur hesum viðvíkjandi.

Blíðar heilsanir

Fyri eftirkomararnar hjá Lauritsi Joensen - eigarar av Lauritsartrøð.


Umboðandi børnini hjá John Joensen

Súsanna Joensen
...........................

Súsanna Joensen
við Matará 11
513 Syðrugøta
Tlf. 281879

Umboðandi børnini hjá Poul Joensen

Elin Joensen
...........................

Elin Joensen
Pedda við Stein gøta 5
100 Tórshavn
Tlf. 282829